# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Johannus Tausen, Runavík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin, 83 ára gamal.

†

Okkara elskaða kona, mamma, omma,
vermamma og verdóttir

**Karoline Rita Hansen**
ættað úr Uldum
búsitandi í Klaksvík

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 21. februar,
60 ára gomul

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni
mikudagin 25. februar kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Hans Eli, Miriam og Jakup**

Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina peningagávu á konto í Norðoya Sparikassa

†

Fríggjamorgunin 20. februar andaðist
á Landssjúkrahúsinum

**Jóhannes Ole Svend Tausen**
Runavík

83 ára gamal

Kistan fer úr Landssjúkrahúsinum
mánadagin kl. 17 í Glyvra kirkju.
Jarðarferðin verður týsdagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Halda, Sæmund og Herjolvur**

Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim, konta í peningastovnunum.

**Dagurin**
**23. februar. Papias**, deyður umleið ár 150. Var biskupur í Hierapolis í Frýgiu í Lítluásiu. Sigst at hava havt samband við ápostulin Filippus.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Prógvhandan á Vinnuháskúlanum



*Aftara rað f.v.: Andras Rasmussen, Dánial Jákup Toftum, Dann Andrew Joensen, Esbern Olivur Lervig, Eyðálvur Holm og Hans Andrias Didriksen. Fremst f.v.: Jákup Egil Joensen, Jan Erik Dyrhuus Poulsen, Mervin Egholm, Regin Ebbe Didriksen, Suni Pauli Esbern Ludvig og Terji Holm Jacobsen. Virðislønir: 1. Jan Erik Dyrhuus Poulsen fekk kikara frá Eik, 2. Jákup Egil Joensen fekk barometur við klokku frá Trygd, og 3. Dann Andrew Joensen, fekk mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.*

*Mynd: Erland Rasmussen*

Fríggjadagin 20. februar fingu 12 maskinistar prógvini handað í skálanum á Vinnuháskúlanum í Havn. Teir byrjaðu sín lestur í august 2008 og allir hava 12 hava staðið útbúgvingina.

Prógvhandanin var fyri øll og røður vórðu hildnar og gávur givnar. Familja, vinir og kenningar hjá næmingunum møttu væl upp og Hans Johannes á Brúgv, Páll Hansen og Jan Erik Dyrhuus Poulsen hildu røðu.

# Gentur í millumskúlaflokki í 1946



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her eru fýra gentur í 4. millumskúlaflokki í 1946.

**Genturnar eru.f.v.:** Anna Jacobsen (Mohr), Sonja Egholm (Danielsen), Ingibjørg Jacobsen (Djurhuus) og Elin Weihe (Mørkøre).

Um onkur hevur hug at ogna sær myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 19).

*Myndaeigari: Ingibjørg Djurhuus*